Álit

í

løgtingsmáli nr. 93/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi (Avtaka markið á 300 bruttotons fyri útlendskar P & I-tryggingar)

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 28. apríl 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 30. apríl og 7. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Betri Trygging og landsstýrismannin í vinnumálum, Jacob Vestergaard.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Herdu krøvini í nýggju sjólógini, sum komu í gildi 1. januar 2026, krevja tryggingar í samband við ferðafólkasigling, ið ikki verða bjóðaðar av føroysku tryggingarvinnuni, fyri smá før so sum ribbátar og onnur før undir 300 bruttotons. Tí er neyðugt sum skjótast at broyta lógina um tryggingarvirksemi, har tað í dag er eitt mark á 300 bruttotons fyri, at útlendsk tryggingarfeløg kunnu tekna tryggingar fyri smá føroysk før, ið sigla við ferðafólkum. Við at avtaka 300 bruttotons markið í §1, stk. 9, nr 3 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, so verður tað gjørligt hjá feløgum, ið virka í føroyskari ferðavinnu við smáførum til ferðafólk, at tekna lógarkravdu tryggingarnar.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 12. mai 2026

Ben Arabo formaður	Atli F. Johansen næstformaður	Fía Selma Nielsen
Erhard Joensen	Árni Skaale	Eirikur í Jákupsstovu
	Steffan Klein Poulsen	